# Triðja bókin hjá Madonnu

**»Yakov og teir sjey tjóvarnir« er um skómakaran Yakov, sum í ótta fyri at missa sjúka einkarson sín, eitar sær hjálp hjá gamla, klóka manninum, ið býr í teim ytstu húsunum í bygdini. Hetta er triðja barnabókin hjá heimsgitnu songkvinnuni, Madonnu**

BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út Yakov og teir sjey tjóvarnir eftir Madonnu. Anna Maria Reinert Jensen hevur týtt úr enskum.

Yakov og teir sjey tjóvarnir er sera vøkur bók við hugtakandi søgugongd um trúgv og bønarmegi. Hetta er triðja barnabókin eftir Madonnu, og hesa ferð fer søgan fram í Russlandi. Søgan er um skómakaran Yakov, sum í ótta fyri at missa sjúka einkarson sín, leitar sær hjálp hjá gamla, klóka manninum, ið býr í teim ytstu húsunum í bygdini. Ikki sørt av humori er í søguni, so hon er løtt at lesa, hóast evnið er dapurt.

Um bókina sigur Madonna, at Yakov og teir sjey tjóvarnir er »ein søga um, hvussu vit øll megna at lata dyrnar til himmalin upp - uttan mun til hvussu lítið verd vit halda okkum vera. Tí í ósjálvsøkni henda undur, í lívum okkara og hjá øðrum.«

Yakov og teir sjey tjóvarnir kostar 120 krónur í bókabúðunum. Hestprent hevur staðið fyri prentgerðini.

Í fjør komu fyrstu tvær barnabøkurnar út eftir Madonnu, Ensku rósurnar og Peabody og súreplini. Í vetur kemur fjórða bókin Søgan um Abdi og væntandi kemur fimta bókin út einaferð komandi ár. Fyrsta bókin fer fram í Onglandi á okkara døgum og onnur bókin í Amerika eftir seinna heimsbardaga. Yakov og teir sjey tjóvarnir fer fram í einum heilt øðrum mentanarligum umhvørvi – einum lítlum býi í Eysturevropa í 19. øld. Tí hevur Madonna valt viðurkenda russiska listamannin Gennady Spirin at myndprýða bókina. Tekningar hansara hóska sera væl til søguna. Spirin hevur myndpýtt 33 barnabøkur og hevur fingið fleiri stórar altjóða heiðurslønir fyri list sína.

Madonna hevur ikki bara eydnuna við sær á altjóða tónleikapallinum. Bøkur hennara eru komnar út á 40 málum í fleiri enn 110 londum og eru altjóða metsølubøkur. Allur vinningurin av bókunum fer óskerdur til Spirituality for Kids Foundation.




*Yakov og teir sjey tjóvarnir er sera vøkur bók við hugtakandi søgugongd um trúgv og bønarmegi*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag :**
Hann minkar vindin niður í lot av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig. Um kvøldið veksur hann vindin upp í ein strúk av landsynningi, men framvegis turt.




**Veðrið hósdagin:**
Skrið ella stormur av landsynningi og regn. Út á seinnapartin minni vindur av útsynningi og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin strúkur í vindi av útsynningi og ælingur, sunnudagin minni vindur av vestri og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 7 og 11 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 3 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 17 |
| Tromsø | 5 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 20 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 17 |
| Berlin | 18 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 18 |
| Bukarest | 22 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 27 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 20 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 18 |
| New York | 28 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 25 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | – |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 980 hPa. við Føroyar fer eystureftir og grynnist. Eitt hátrýst, 1027 hPa. við Azorurnar fer eystureftir og ein hátrýstryggur til Grønlandsfjørðin verður yvir Føroyum mikudagin.




Hátrýstryggurin yvir Føroyum fer eystureftir. Látrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga í landnyrðing og dýpist. Hitabrúgvin haðani verður yvir Føroyum hósdagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/09 kl. 06[00]–14/09. 06[00]. Hitin í gjár: 8,3°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° - Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 49,0 mm – mált frá 13/09 kl. 06[00]–14/09 kl. 06[00]
Avfallið higartil í september: 104,4 mm

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

## VESTFALLSKYRRINDI

8. sept.: Mánin longst frá jørðini
14. sept.: Tendring
21. sept.: Fyrra kvarter
22. sept.: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. sep | 07.59 | 20.18 | 06.59 | 19.18 | 07.14 | 19.33 | 09.59 | 22.18 | 10.59 | 23.18 | 06.14 | 18.33 | 05.14 | 17.33 | 08.14 | 20.33 | 09.14 | 21.33 | 07.44 | 20.03 | 08.59 | 21.18 |
| 16. sep | 08.37 | 20.57 | 07.37 | 19.57 | 07.52 | 20.12 | 10.37 | 22.57 | 11.37 | 23.57 | 06.52 | 19.12 | 05.52 | 18.12 | 08.52 | 21.12 | 09.52 | 22.12 | 08.22 | 20.42 | 09.37 | 21.57 |
| 17. sep | 09.18 | 21.39 | 08.18 | 20.39 | 08.33 | 20.54 | 11.18 | 23.39 | — | 12.18 | 07.33 | 19.54 | 06.33 | 18.54 | 09.33 | 21.54 | 10.33 | 22.54 | 09.03 | 21.24 | 10.18 | 22.39 |
| 18. sep | 10.01 | 22.23 | 09.01 | 21.23 | 09.16 | 21.38 | — | 12.01 | 00.39 | 13.01 | 08.16 | 20.38 | 07.16 | 19.38 | 10.16 | 22.38 | 11.16 | 23.38 | 09.46 | 22.08 | 11.01 | 23.23 |

5 707265 100036 >